# Kvinnulisti nærum fullteknaður

Nøvnini á 8 kvinnum komu á kvinnulistan mikukvøldið eftir fundin "Kvinnur! Takið eisini ábyrgd í politikki!", sum Tofta Kvinnufelag skipaði fyri. Tað er fimtu ferð, at kvinnulistin stillar á Toftum.

At so fáar kvinnur eru við í politikki, er ein fólkasjúka! Soleiðis tók Kristina W. Andreassen til á fundinum, sum Tofta Kvinnufelag skipaði fyri mikukvøldið. Kristina var fyrsta kvinnan, ið varð vald í bygdarráðið á Toftum í 70'unum.

Kristina fortaldi millum annað um arbeiðið at fáa fótbóltsvøllin, sum harliga trongdist til tey ungu. Hóast tað eru mong ár síðani Kristina gavst í bygdarráðnum, og væl komin til aldurs, er hon framvegis eldhuga fyri politikki, og eggjar yngru kvinnunum at halda seg framat. Kristina var ein av trimum kvinnum sum á fundinum søgdu frá sínum royndum í lokalpolitikki.

**Vardi ansingina**

Jancy Olsen, forkvinna í kvinnufelagnum, hevur eisini verið sera virkin í politikki. Hon hevur júst sagt seg frá sum næstforkvinna í Javnaðarflokkinum, og sum lokalpolitikari gjørdi hon tænastu í 8 ár. Hon varð vald í bygdarráðið á fyrsta kvinnulistanum, sum stillaði í 1988. Jancy sat í tvey valskeið. Á fundinum greiddi hon millum annað frá um hvussu trupult tað mangan var, at fáa endarnar at røkka saman, tá grunt var í kommunukassanum.

- Tá mennirnir vildu skerja barnaansingina, so mammur, ið vóru heima vegna barnaburð, ikki skuldu fáa ansingartilboð til størri børnini, segði eg korta nei! greiddi Jancy frá, sum eitt dømi um hvørji málsøki hon hevði stríst fyri.

Til valið í 1996 stillaði Jancy ikki uppaftur, og tá varð Katrin Poulsen vald á kvinnulistanum. Hon hevur sitið í 8 ár, og stillar ikki uppaftur hesaferð. Katrin er leiðari fyri dagrøktina, og hevur eisini eitt festi at taka sær av. Kommunufundirnir eru um kvøldið, og Katrin dylir ikki fyri, at tað krevur fitt av orku at arbeiða við kommunupolitikki.

– Men kommunupolitikkur er spennandi og sera áhugavert arbeiði, sum eg havi røkt í 8 ár. Nú vil eg fegin lata aðrar sleppa framat, sigur Katrin.

**Ein vansi**

Á Toftum stilla tey ikki eftir flokki. Bert ein almennur listi er, og á listanum eru 11 valevnir - av hesum bert ein kvinna.

Alfred Olsen, kommunuskrivari og tingmaður hjá Sambandsflokkinum, segði í sínum innleggi, at kvinnulistin hevur skyldina í, at so fáar kvinnur stilla á hinum listanum.

- Kvinnulistin virkar kanska móti síni ætlan. Tí tá kvinnurnar vita at hesin listin kemur, vil eingin á tann almenna listan, og tað er spell, helt Alfred Olsen. Hann strikaði undir, at tað veruliga er tørvur at fáa fleiri kvinnur við - bæði í lokalpolitikki og í landspolitikki.

Royndi landspolitikarin ásannaði tó, sum víst var á, at skulu tey á Toftum hava møguleika at velja fleiri enn eina kvinnu á hesum kommunuvalinum, má ein listi gerast afturat. Tí almenni listin er liðugur, og á honum er, sum nevnt, bert ein kvinna.

**Felags ábyrgd**

Annika Wardum Joensen var eisini gestarøðari á fundinum mikukvøldið. Hon gjørdi eitt tankaeksperiment, og bað fundarfólkið ímynda sær eina politiska skipan, har einans kvinnur sótu við valdinum.

– Hvørjar raðfestingar høvdu tá verið gjørdar? Hevði tað verið ein nóg góð skipan og hevði rætt verið raðfest? Kanska sæð frá okkara sjónarhorni, men neyvan frá einum samfelagssligum. Í politikki tørvar okkum bæði kvinnur og menn. Okkum tørvar at taka ábyrgdina saman, so vit fáa ein politikk, har áhugamálini hjá øllum pørtum í samfelagnum verða raðfest, segði Annika.

**Nærum fullteknaður**

Fyri fundin var ikki gjørt av, um kvinnulistin á Toftum fór at stilla aftur hesaferð. Men eftir fundin vóru longu átta nøvn á listanum, og trý koma helst afturat. Listin verður klárur í hesi vikuni, sigur Jancy Olsen, forkvinna í Tofta Kvinnufelag.

## VIÐMERKINGAR

# Føroysku fjølmiðlarnir og vinnan

**Atli Hansen**



Dastið av føroysku fjølmiðlunum tykist at hava tað best við at dyrka tað negativa og tað gølukenda, tá ið tað snýr seg um føroysku vinnuna. Teir leggja lítið í at vera til staðar við tí góða orðinum tá íð tað gongur væl og tá íð framgongd við íløgum verður veksløð um til nýhugsan og frambrot. Lítil og eingin hugur er at bera tær ljósu søgurnar víðari, sum eisini standast av, at tað gongur væl.

Pelagiska vinnan er einki undantak. Nú hevur tað gingist væl í nøkur ár og tí hevur dúgliga verið sneytað í roknskapum fyri at vita, hvat yvirskotini hava verið og hvat tey verða nýtt til við tí undirtóna, at hetta helst rennur niður í nakrar reiðara- ella partaeigaralummar. Rækjuflotin við sínum undirskotum fekk toyggið í undanfarnu viku. Ókvalifiseraðar illgitingar um støddina av eginpenginginum sum ein fylgja av uppskrúvaðum virðum á skipum hava avdúkað eina ófatuliga lítla vitan hjá blaðmanninnum um roknskaparliga eftirliti á hesum øki.

Serliga hava blaðmenn á Dimmalætting roynt at íðkað hesa grein og við jøvnum millumbilum verið teir ídnastu at finna sær eina rók at skapa sær livibreyð á í hesum samanhangi. Í seinastuni hevur tað so verið Georg L. Petersen, sum er komin aftur á vøllin sum umboð fyri henda bólkin í blaðhúsinum.

Fyrst royndu teir at finna út av, hví útlendskur kapitalur hevði so lætt spæl í føroysku fiskivinnuni. Teir funnu ikki út av nøkrum og máttu sleppa endanum. Seinni hevur Georg roynt at mistonkiliggera ein ávísan kapitalvøkstur í pelagiska flotanum og lýst tað sum nakað ivasamt. Hann hevur helst ikki funnið út av, at fleiri nøggj skip eru komin til landið. Man roknar helst við á blaðnum at hava eitt størri undirhaldsvirði við at illtonkja og skapa mystik enn bert at frøast saman við teimum, sum hava verið við til hesa framgongd. Hvaðani skulu íløgur í framtíðina koma, um tað ikki er frá vøkstri?

Í síni framhaldandi negativu herferð skal Georg nú royna at finna út av, hví íðnaðarbátar ikki kunnu fáa fiskiloyvi á sama hátt sum pelagisku skipini. Hví íðnaðarbátar ikki kunnu fiska sum nótaskip. Og tá ið hetta fyri honum er ein trupul spurningur, hevur hann fingið sær advokathjálp frá einum, íð av royndum eigur at vita nakað um málið.

Svarið er so einfalt sum tað, at hetta eru tveir ymiskir skipabólkar, sum hava fingið veiðu- og fiskiloyvir út frá ymiskum fortreytum. Frá byrjanini av hevur verið tosað um ídnaðarbátar við botntroli mótvegis trol- og nótaskipum, sum við nót síðani fyrst í 60-unum og flótitroli síðani 1976 hava roynt eftir uppsjóvarfiski. Í øllum okkara grannalondum er hetta eisini atskildir bólkar. Og tað slepst ikki ímillum teir.

Lógin um vinnuligan fiskiskap kann fáa skyldina fyri nógv og er helst ikki nakað meistaraverk innan lógarsmíð. Men á onkrum økjum er hon nóg greið m.a. í § 8. Har er tað blaðmaðurin villist í síni tulking, tá í hann sigur, at sama slag skip fáa ymiska viðgerð. Tað er ikki slagið av skipum, men hvønn fiskiskap, tey reka ella hvønn bólk, tey hoyra til, sum er avgerandi fyri hvørji loyvir tey fáa.

Tá ið blaðmaðurin enntá kan fáa tað til, at " nú er eingin møguleiki at keypa nýggjari og betri skip", so er hann farin heilt av kós og hevur valla skilt nakað sum helst av tí, hann roynir at fáa eina grein burtur úr. Tað er veiðuorka og ikki aldur og góðska, sum lógin um vinnuligan fiskiskap leggur til grund. Einhvør fær innflutningsloyvi til nýggjari og betri skip, men ikki við størri veiðu orku.

Í grein í Dimmalætting 12.10.04 við heitinum "Grundgevingar í leysari luft" nevnir Georg L. Petersen bæði Havørnina og Atlantsfarið sum dømir. Eitt sindur ógreitt um tey eru dømir um tað sama ella tað øvugta.

§ 7 í lógini um vinnuligan fiskiskap sigur greitt, at í minsta lagi 2/3 av ognarpeninginum, sum somuleiðis eiga í minsta lagi 2/3 av atkvøðurættinum skulu hava fast tilknðti til Føroyar. Allir (partaeigarnir) skulu vera skrásettir í fólkayvirlitinum seinastu 2 árini og allir skulu vera fult skattskyldugir í Føroyum. Eisini her her er lógin greið.

Hvørt mansbarn í Føroyum veit, at bæðið hesi nevndu skipini eru 100 % norsk ogn. At tann advokaturin, sum hevur verið ráðgevi í minsta lagi við keypi av øðrum av teimum nevndu skipum, eisini argumenterar fyri at tey skulu hava kvotur, er ikki so undarligt. Keypið skal rættvísgerast. Endamálið halgar gerðina. Fáa tey ikki kvotur frá pelagiska flotanum, herja tey væl á rækjuskipini ella barentshavstrolarnar, hóast tey út frá tí veruliga eigaraskaranum at døma ikki hava rætt til ein stert.

Leitar man upp roknskapartøl fyri hesi skip, kann man undrast yvir, at tílík projektir fáa loyvi til at akkumulera 10-tals milliónir í undirskot og tilsvarandi negativa eginogn í smápartafeløgum, uttan at nakar ger nakað við tað. Hetta var ein trupulleiki í 80-unum, sum nýggjar lógir vórðu gjørdar sum verja ímóti. Galda tær ikki fyri øll og serliga øll smápartafeløg? Ella hevur norski kreditorurin ("fyrrverandi" eigarin) kautionerað fyri partapeningin?

At landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum og hansara umsiting tekur sínar avgerðir m.a. út frá lógini um vinnuligan fiskiskap, er einki at siga til. Hetta skulu teir gera eftir bestu sannføring uttan mun til góðskuna av lógarsmíðinum.

Men landsstýrismaðurin hevur aðrar uppgávur enn at umsita. Hann kann (og skal) eisini reka politikk. Hann hevur til uppgávu at geva aktørunum á sínum málsøki bests møgulig kor, soleiðis at samfelagið sum heild fær sum mest burtur úr sínum tilfeingi. Og hetta kann hann gera við at hjálpa teimum, sum hava tað trupult eina tíð ella at ansa eftir har, sum tað gongur væl og at rudda upp í tí, sum onga meining hevur. Tað verður í dag í Fiskimálaráðnum nýtt alt ov nógv orka at viðgera mál umaftur og umaftur og harvið útseta seg sjálvan fyri eitt vaksandi trýst, sum er darvandi fyri alt virki á stovninum. Lat okkum fáa hesa orku umsetta til visiónir og arbeiði fyri at gagnnýta okkara tilfeingi best møguligt.

Fiskimálaráharrin eigur at hugsa stórt og breitt og ikki at lata sína tíð fara við smámálum. Og tá íð landsstýrismaðurin er úti í sínum politisku ørindum er tað hvørki blaðmanninum á Dimmalætting ella hansara advokathjálp, hann skal standa til svars yvirfyri, men bert sínum politiska baklandi – samgongu og flokki.

Tá íð um fiskivinnuøki ræður og fyri at læra seg at hugsa positivt fari eg at mæla føroysku fjølmiðlunum til at lesa tey bløð, sum koma út á hesum økinum í okkara grannalondum sum t.d.. Fiskifrettir, Fiskaren, Fiskeribladet, Fiskeritidende og Fishing News. Við hvørt kann ein gerast í góðum lag av at lesa tann positiva tíðindaflutningin í hesum bløðunum.

Við vón um betring.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Agnas Fjallsá, Tórshavn:

## 25 ára starvsdag hjá Tryggingarfelagnum Føroyar



Í dag, fríggjadagin 15. oktober 2004, hevur Agnas Fjallsá 25 ára stavsdag hjá Tryggingarfelagnum Føroyar.

Agnas er úr Havn. Hon byrjaði á Føroya Brunatrygging á "Glade Hjørn" í 1967. Har arbeiddi hon í tveimum tíðarskeiðum og var burturfrá í nøkur ár.

Síðan 1984 hevur hon havt fast starv á stovninum, fyrst á Brunatrygging við Smyrilsvegin.

Í dag er hon á skaðadeildini á Vanlukku-tryggingini á Kongabrúnni, har allar deildirnar hjá Tryggingarfelagnum nú halda til.

Foreldrini hjá Agnas vóru Signhild, f. Jensen, úr Havn, og Johan Wolles, ættaður av Trøllanesi.

Agnas er gift við Erik Fjallsá úr Klaksvík. Børnini eru Johan, Ruth, Randi og Erik, sum øll búgva í Havn. Hon eigur eisini fimm ommubørn.

## Baldvin Baldvinsson seksti



Fríggjadagin 15. okt. verður ein kendur havnarmaður seksti, og tað er eingin annar enn Baldvin Baldvinsson, málarameistari.

Ótrúligt at árini eru vorðin seksti hjá hesum unglinga, ið so lættan sæst fara runt býin, og sum altíð er til reiðar við einum smíli ella skemtandi orði.

Baldvin er uttan iva best kendur sum fótbóltsspælari, og eftir at vera givin sum spælari, og sum ein av okkara bestu fótbólts-dómarum, er hann forrestin virkin enn sum eygleiðari.

At Baldvin er B.36-ari er eingin loyna, ja, eg haldi hann er B.3600-ari, so heilhjartaður sum hann er í felagnum.

Og tí er einki løgið í, at hann fegin vil hitta vinfólk og kenningar fríggjamorgunin í B.36-húsinum, sjálvandi.

Og mong munnu tey vera, ið koma at heilsa upp á teg Baldvin. Vit á kondittarínum koma í øllum førum.

Hjartaliga tillukku á runda degnum ynskja vit tær Baldvin.

**Konditaristarnir**

## Óluva Jacobsen 75 ár



Í dag, 15. oktober, verður Óluva Jacobsen á Strondum 75 ár.

Óluva er ættað úr Nólsoy, foreldur hennara vóru Petra og Clæmint Jacobsen.

Hon fór sum ung til Havnar at tæna og arbeiddi eisini á Apotekinum og á Sjómansheiminum.

Í 1950 giftist hon við Elias Jacobsen úr Kolbanagjógv, og náddu tey í 2000 at halda gullbrúdleyp, men umleið 1 ár seinni andaðist Elias, sum í mong ár var illa plágaður av Parkinson sjúku.

Fyrstu umleið 2 árini búðu tey í Kolbanagjógv, men síðani bygdu tey inni á Strondum, og har hevur Óluva virkað síðani sum heimaarbeiðandi húsmóður.

Tey eiga 4 børn, Katrin, Klæmint, Lauru og Óla. Genturnar báðar búgva í Danmark, meðan dreingirnir búgva á Strondum. Ommubørnini eru 3 í tali og langommubørnini eru 2.

Føðingardagin er Óluva burturstødd.

## Dagurin

**15. oktober. Heiðveig**, deyð í 1243. Hon var greivadóttir úr Bayern og giftist hertoganum Heinriki 1 í Slesiu. Hon bygdi fleiri sjúkrahús og kleystur. Gav seg sjálv í nunnnukleystur, har hon doyði. Varð skírd halgikvinna í 1267.

Heiðveig er føroyska navnið Hedvig.

Upprunaliga týskt navn, samansett av tveimum orðum sum merkja *stríð* og *víggj*.

# Kaj – Ein dokumentarisk ævisøga

**Í sambandi við at fyrsta bind av ævisøguni um kenda skipparan, Kaj Johannesen (1910-93), ættaður úr Hvannasundi, kemur út í november, er faldari sendur í hvørt hús í landinum**

NÝGGJ BÓK
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin*




Bókin er skrivað av journalistinum Justinus Leivsson Eidesgaard.

Høvundurin sigur, at orsøkin til at bókin eisini verður seld á hendan hátt er at røkka kundum, sum ikki hava dagliga atgongd til ein bókahandil.

Justinus er uppvaksin í Oyndarfirði í einum fiskimannaheimi, og hevur fingið prátið um fiskivinnu inn við móðurmjólkini. Hetta hevur eisini sæst aftur í hansara arbeiði sum journalistur. Hann hevur í mong skrivað um fiskivinnu og hevur verið skotin í persónligheitunum í hesi vinnu.

Bókin er dokumentarisk, byggir allan vegin á skjøl, og út frá skjølunum er farið út at prátað við fólk. Nógvar spennandi og forkunnugar myndir eru í bókini. Útgevari er Forlagið Hellurnar v/ Jústinus Leivsson Eidesgaard.



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost:
**post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til:
**Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn**
**merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin

## 90 ára føðingardagur

Í dag, 15. oktober, fyllir Kathrina Streymoy í Vestmanna 90 ár. Føðingardagurin verður hildin í Miðhøllini í Vestmanna Skúla frá kl. 18.00.